## Fáar ísbjarnir um 50 ár



Vísindafólk hava leingi ávarað um, at tann veksandi hitin á Jørðini er ein álvarssom hóttan ímóti ísbjarnunum, og nú siga kanningar hjá amerikanska jarðfrøðistovninum, at um 50 ár verður talið á ísbjarnum bara ein triðing av tí, sum tað er í dag. Orsøkin er, at ísurin kring Norðpólin bráðnar skjótari enn fyrr hildið. Tað er amerikanska stjórnin, sum hevur biðið um kanningina, tí USA fer møguliga at skráseta ísbjørnina sum eitt hótt djóraslag.

## 52 nýggj folk í Eik

Virksemið hjá Eik er vaksið somikið nógv seinasta árið, at bankin seinasta árið hevur sett 52 nýggj folk í starv skrivar 123.fo. Millum hesi nýggju starvsfólk eru 11 nýggir bankanæmingar, ið byrjaðu fyri viku síðan. Ein nýggj deild er eisini farin til verka - Eik Investment Banking - við Gordoni Rajani sum deildarleiðara; og Fíggjardeildin er umskipað, soleiðis at Sverri Justinussen nú er deildarleiðari á Eik Markets, meðan Finn Danberg framhaldandi er deildarleiðari á Fíggjardeildini.



*Hendan myndin lýsir, hvussu økið við Grønhólm sær út – hvar lambið er sokkið í evjuni og ikki sleppur upp úr aftur*





*Tilsamans fimm seyðir hjá Archibald Black, bónda, sum hevur tikið hesar myndirnar, eru gjøgnum árini soknir í hesi evju, harav í minsta lagi tveir eru deyðir*

# Evjuplássið skal burtur

**- Vit hava nú verið í samband við IRF og hava boðað felagsskapinum frá, at teir eru uppsagdir. IRF fer at tøma brunnarnar og fylla uppaftur við gróti, sigur Heri Hammer, býarverkfrøðingur hjá Klaksvíkar kommunu**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri høvdu bæði borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Steinbjørn O. Jacobsen og býarverkfrøðingurin, Heri Hammer, greinir í Norðlýsinum, har teir siga, at økið í Ánunum, har IRF hevur tømt rottangar, skal riggast av.

Borgarstjórin vísir á, at øll eiga at gera sítt til, at slíkar hendingar, sum tilburðurin við lambinum hjá Archibald Black, ikki skulu henda.

Steinbjørn ásannar, at tað er IRF, sum hevur ábyrgdina av umtalaða økinum í Ánunum, men fyri at bjarga íkomnu støðuni næst seinasta sunnudag, gav hann boð um, at neyðuga hjálpin beinanvegin kom á staðið, so lambið kom upp á turt aftur.

Hann vísir á, at fyrst í nítiárunum yvirtók IRF gomlu evjuplássini hjá kommununi í Ánunum, og síðan tá hevur felagsskapurin havt ábyrgdina av nevnda øki – og harvið eisini ábyrgdina av, at økið er nøktandi avhegnað.

- Í sambandi við nýggju góðshavnina, hevur býráðið fyri góðum ári síðan sagt upp leigumálið við IRF, tí kommunan ynskir hetta plássið riggað av. Men vegna vantandi pláss aðrastaðni, hevur býráðið tó givið loyvi til, at IRF í eina avmarkaða tíð aftrat hevur verið á økinum.

Steinbjørn O. Jacobsen sigur, at IRF nú hevur játtað at tøma evjuplássið og fylla plássið aftur við gróti, og hetta verður gjørt í samskifti við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, leggur hann aftrat.

- Sostatt kann roknast við, at IRF í næstum fer at riggja evjuplássið í Ánunum av.

Borgarstjórin sigur, at fyri í mest møguligan mun at umgangast, at seyður sleppur inn um býarhegnið, er býargartnarin biðin um at kanna umstøðurnar nærri og gera neyðugu ábøturnar.

Býarverkfrøðingurin, Heri Hammer, sigur við Norðlýsið, at hann hevur verið í sambandi við IRF um støðuna við Grønhólm.

- Vit hava nú verið í samband við IRF og hava boðað felagsskapinum frá, at teir eru uppsagdir. IRF fer at tøma brunnarnar og fylla uppaftur við gróti, sigur Heri Hammer, býarverkfrøðingur hjá Klaksvíkar kommunu.

